## DAGSINS MEINING

# Skelkandi - 700 misnýtarar í høvuðsstaðnum

Tað var skelkandi at frætta, at 700 misnýtarar eru í høvuðsstaðarøkinum. Sjálvandi vil onkur seta spurnartekin við talið og yppa øskl. Men talið kemur frá einum løgtingsmanni, sum hevur verið á fundi í Lokalnevndini. Tað er nevndin hjá Løgtinginum, sum hevur eftirlit við løgregluni. Tí má talið verða á leið.

Víst vita tey, sum hava við ungdóm at gera, at heilt nógv hasj og annað, er millum ungdómin, men at talið er so høgt kemur óivað óvart á. Hóast talið kanska er í so høgt sett, so eigur tað at fáa myndugleikan at rakna við. Og við myndugleikar hugsa vit bæði um tann politiska myndugleikan, tollvaldið, fyribyrgingarráðið og eisini skúlan.

Grundleggjandi má ungdómurin alla tíðina upplýsast og kunnast um rúsevni - tað verið seg rúsandi løg og euforiserandi evni - og í hesum samstarvi má góð samvinna vera millum skúlaverkið og fyribyrgingarráðið. Er henda upplýsing ikki nóg dygg, so má hon gerast betri, so øll vita um vandan at roykja ta fyrstu pípuna, taka ta fyrstu tablettina ella taka onnur rúsandi evni.

Er støðan versnað, má politiski myndugleikin taka upp neyvari samstarv við løgreglu og tollvald, og leggja eina ætlan fyri, hvussu misbrúkið kann tálmast og fáast niður í nærum einki. At fáa misbrúkið heilt burtur, ber neyvan til, tí nøkur gerast altíð so tengd at rúsandi evnum, at tey gera alt, sum tey kunnu, fyri at fáa fatur í teimum.

Um løgregla og tollvalda halda, at neyðugt er við størri orku, má politiski myndugleikin eisini kunna veita eina størri játtan, tí tað ber ikki til, at ein stórur partur av okkara ungdómi "gongur skeivur".

Upplýsing um rúsandi evni má eisini vera ein táttur í tí átakinum um eina betri fólkaheilsu. Eitt átak sum miðjar eftir at fáa børn og vaksin at eta sunnari, at fáa fólk at gevast við at royka, at fáa fólk at røra seg meira, at fáa fólk at hugsa um arbeiðsstøður og skapa møguleikar fyri, at allar føroyingar fáa eitt innihaldsríkt lív og eina betri heilsu.

Løgreglan - og serligi narkobólkurin hjá løgregluni - kennir umhvørvið, og dugir best at meta, hvussu stórt misbrúkið er. Myndugleikin má tí taka hetta ógvisliga talið í størsta álvara og ikki bíða ein dag at taka hetta álvarsmál upp. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur ikki ligið á tí latu síðuni, so væntandi letur hann ikki málið fara aftur við borðinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vestmanna sum orkudepil



**Har er longu eitt SEV-verk, ein vindmyllupark og har er eisini longu ein ætlan, sum er komin langt ávegis viðvíkjandi sólorku. Harafturat hevur Vestmanna grønar skúlar. Tosa vit um alternativa orku, ja so tosa vit um Vestmanna.**

**Ingi Olsen**
*løgtingsmaður*

Havandi søguna í huga, so haldi eg at Vestmanna sum pionerbygd hevur, sum teir siga í fiskivinnuni, vunnin rættindi á økinum, sum áttu at koma til góðar nú.

Landsstýrismaðurin í orkumálum, hevur nú lagt fyrsta ávegis álitið um orku fyri tingi. Taað er av sera stórum týdningi at hetta nú er komið, og at vit við hesum hava fingið gjørt kanningar og fest niður á blað so nógv um hetta evni.

Undir framløguni kom fram, at landsstýrismaðurin hevur skotið upp fyri Norðurlandaráðnum, at Føroyar verða við í eini grannskingarætlan hvørs endamál er at kanna framkomnar orkukeldur til fjarskotin øki. Tað sum undrar meg nakað er, at Nólsoy verður skotið upp.

Ásannandi, at Vestmanna altíð hevur verið fremst tá um orku ræður, bæði viðvíkjandi grønari orku og so sann eisini hvat vindorku ræður, - og at vit hava stórt sæð øll vinnutólini á staðnum, so haldi eg, at Vestmanna vildi verið rættari stað at gjørt hesar ætlanir.

**Hví ikki nýtt Vestmanna til orkudepil?**

Har er longu eitt SEV-verk, har er longu eitt vindmyllupark og har er eisini longu ein ætlan, sum er komin langt ávegis sum viðvíkur sólorku. Aftrat hesum hevur Vestmanna grønar skúlar. Vit kunna siga, at tosa vit um alternativa orku, ja so tosa vit um Vestmanna.

Havandi søguna í huga, so haldi eg at Vestmanna sum pionerbygd hevur, sum teir siga í fiskivinnuni, vunnin rættindi á økinum, sum áttu at koma til góðar nú.

# Heimsins framkomnasta land – flest deyð í ferðsluni



**Alt meðan løgmaður arbeiðir fyri, at Føroyar skal gerast heimsins mest framkomnasta land, doyggja fleiri fólk í ferðsluvanlukku í Føroyum, enn í nøkrum av hinum Norðurlondunum. Ein av orsøkunum til hesa syndarligu støðu er vantandi vilji frá politiskari síðu at taka ferðslutrygdina í álvara**

**VIÐMERKING**
*Rúna Sivertsen*
*Formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

Tað er ikki tað ting, ið ikki kann kannast, og við kanningum er møguligt at finna orsøkir og gera niðurstøður.

Sjálvt við at kanna lutir, ið eru elligamlir, ber til at finna útav tí ótrúligasta.

Men í sambandi við eitt ferðsluóhapp Millum Fjarða, har eitt hjól loysnaði av einum trailara, segði vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík til Sosialin, at tað bar ikki til hjá honum at staðfesta nágreiniliga, hvør orsøkin var til óhappið.

Víðari sigur løgreglumaðurin, at tá hendingin er hend, so hava vit ongan møguleika at kanna, hvørt hetta var vegna vantandi eftirlit, ella um talan var um eitt brek av onkrum slag.

Sjálvsagt kann løgreglumaðurin ikki staðfesta, hví hjólið loysnaði. Tað er ikki hansara uppgáva, og ei heldur er hann útbúgvin at kanna slíkt. At siga við ein fjølmiðil, at tað ikki ber til at kanna og staðfesta orsøkina er púrasta burturvið.

**Neyðugt at kanna**

Tá vanlukka hendir á sjónum, verður kanning gjørd, sjóforhoyr hildið og frágreiðing skrivað. Men tá ferðsluvanlukkur henda í Føroyum, verða tær ikki kannaðar út í æsir, soleiðis, sum gjørt verður í grannalondum okkara.

Løgmaður hevur sagt, at Føroyar um stutta tíð skal verða heimsins mest framkomna land. Hetta ljóðar mikið gott, og mítt inniliga ynski er, at tað skal gangast okkum eftir ynski løgmans.

Men tá tað kemur til ferðsluna, kunnu vit ikka siga annað, enn at Føroyar eru eitt tilafturskomið land.

Av Norðurlondum eru Føroyar ringast fyri, tá ið talan er um deyð í ferðsluni.

Í teir 49 dagarnar, sum higatil eru farnir av hesum árinum, hava vit mist fýra mannalív orsakað av ferðsluvanlukkum.

Hetta kunnu vit ikki tigandi hyggja at og góðtaka!

**Hvørki mið ella mál**

Nú er upp á tíðina at seta niður eina ferðsluskaðanevnd, soleiðis at veruligu orsøkirnar til óhapp og vanlukkur í ferðsluni kunnu finnast.

Føroyar er einasta land í Norðurlondum, sum ongan ferðslupolitikk hevur. Hetta undrast hini londini stórliga á, ikki minst, tá tey síggja, hvussu nógvar álvarsligar vanlukkur henda hjá okkum.

Hyggur tú inn á heimasíðuna hjá Vinnumálaráðnum, sum umsitir ferðslumál, er ikki eitt einasta orð at finna um ferðslu ella ferðslupolitikk.

Einans ein slóð til heimasíðuna hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd ber boð um, at Vinnumálaráðið hevur nakað við ferðslu at gera.

Tað er flóvisligt at umboða Føroyar á norðurlendsku fundunum, og noyðast at viðganga, at enn hevur politiski myndugleikin ikki fingið í lag at samtykkja ein ferðslupolitikk fyri Føroyar.

Tað er tó ikki tað ringasta.

Tað ringasta eru avleiðingarnar av, at vit í Før-oyum taka ferðslutrygdina í so lítlum álvara!

**Fakta:**
Í Føroyum eru seinastu 10 árini, í miðal, fleiri enn 8 fólk deyð í ferðsluvanlukku, í mun til 100.000 fólk.
Í Noregi og Svøríki er talið 5-6.
Í Finnlandi 6-7.
Í Danmark 7-8.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.